# Deplar til børn við serligum tørvi

**– Frustrasjónirnar, vit síggja í fólkaskúlanum í dag, koma fyri ein stóran part av, at allir næmingar skulu integrerast í sama skúla. Tað er veruleikafjart at halda, at øll børn kunnu integrerast. Tí eiga vit at gera deplar til børn, sum fella uttan fyri skúlan, sigur Jógvan á Lakjuni, formaður í mentunarnevnd Føroya Løgtings**

SKÚLIN
*Turið Kjølbro*

– Sum politikarar hava vit skyldu til at kunna okkum um ymisk viðurskifti, og ein slík ferð sum hendan víðkar avgjørt sjónarringin, sigur Jógvan á Lakjuni, formaður í mentunarnevnd Føroya Løgtings.

Mentunarnevndin hjá Løgtinginum er júst afturkomin av kunningarferð í Svøríki og Danmark. Í Stokkhólmi og Linkøping hevur nevndin kunnað seg um KT-útbúgvingar, og í Keypmannahavn hevur nevndin vitjað tveir skúlar. Endamálið við hesum partinum av túrinum var at fáa kunning í, hvussu danir leggja til rættis skúlagongdina hjá børnum við serligum tørvi, í og uttan fyri skúlaaldur, og hvørjar ætlanir eru fyri framman hesum viðvíkjandi. Og sum skilst á formanninum í mentunarnevndini hava danir nøkulunda somu trupulleikar at dragast við, tá ið tað snýr seg um børn við serligum tørvi.

– Tað er mangan ringt at gera av, um ein næmingur skal inn í ein flokk ella ikki. Í so máta er støðutakanin til hendan spurningin líka trupul niðri sum her, sigur Jógvan á Lakjuni.



*– Stór ónøgd er, ikki bert innan fólkaskúlan, men eisini millum foreldur, sum eiga børn við serligum tørvi. Viðurskiftini í Føroyum eru ikki nøktandi sum er, sigur Jógvan á Lakjuni, formaður í mentunarnevnd Føroya Løgtings.*

## Serskúli og fólkaskúli

Skúlarnir, mentunarnevndin vitjaði, vóru rættiliga ymiskir. Tann fyrri var ein serskúli til næmingar við sálarligum og likamligum breki, harav nógvir vóru rættiliga sjúkir.

– Danir hava sum eitt stórt samfelag nógv øðrvísi og betri møguleikar at savna børn við serligum tørvi í deplar. Serskúlin, vit vitjaðu, eigur amtið og mær kunnugt rindar amtið eisini raksturin av honum, sigur Jógvan á Lakjuni.

Hin skúlin, mentunarnevndin vitjaði, var ein vanligur fólkaskúli við umleið 600 næmingum. Hetta svarar til størsta skúlan í Føroyum. Hesin skúlin hevur umframt vanliga integrering, eina deild til næmingar, sum fella uttanfyri annaðhvørt vegna serligan sálarligan ella likamligan tørv.

– Henda loysnin kundi verið nýtilig í Føroyum. Annaðhvørt at brúkt part av einum skúla ella ein skúla burturav í einum øki til næmingar við serligum tørvi. Frustrasjónirnar, vit síggja í fólkaskúlanum í dag, koma í øllum førum fyri ein part av, at allir næmingar skulu integrerast í sama skúla. Tað er veruleikafjart at halda, at øll børn kunnu integrerast.

Jógvan á Lakjuni hevur fyrr tosað fyri at gera serligar deplar til børn við serligum tørvi.

– Prinsippið, at skúlin er fyri øll, bagir einki, men vit mugu síggja í eyguni, at tað altíð vera næmingar, sum fella uttanfyri so ella so. Tí er eftir mínum tykki skilagott at gera smærri deplar, eitt nú ein depil fyri hvørt stórt øki í Føroyum. Eina liðiliga skipan sum eigur at verða tillagað tørvin til eina og hvørja tíð. At børn sum hava serligan tørv ikki hava eitt alternativ sum er, er ógvuliga spell, og eg dugi ikki at síggja, at vit ikki eisini kunnu gera slíkar eindir her.

## Aktuelt

Grundin til, at mentunarnevndin hevur verið uttanlands og fingið kunning um spurningin, hvat tilboð børn við serligum tørvi eiga at fáa, er tí, at hesin spurningurin er ógvuliga aktuellur í løtuni.

– Tað vísir seg vera ógvuliga stór ónøgd, ikki bert innan fólkaskúlan, men eisini millum foreldur, sum eiga børn við serligum tørvi. Viðurskiftini í Føroyum eru ikki nøktandi sum er. Henda kunningarferðin hevur saman við vitjanini á Sernámsdeplinum undan uttanlandsferðini, givið okkum eitt betri innlit og ger okkum betur før fyri at viðgera henda spurningin. Ikki minst, tá ið tilmælið um sernámsfrøði kemur til aðalorðaskifti í tinginum. Møguliga hevði verið líka skilagott at vitjað eitt minni samfelag, sum líkist meiri okkara. Hinvegin sóu vit í Keypmannahavn, at tey hava somu trupulleikar sum vit hava, sigur Jógvan á Lakjuni at enda í viðtali.




FERÐAÆTLAN VETURIN 2001/2002
Tyrlutænastan

| SUNNUDAG | Fráferð |
|---|---|
| Vágar | 12.00 |
| Gásadal | 12.06 |
| Mykines | 12.12 |
| Vágar | 12.23 |
| Vágar | 13.00 |
| Koltur | 13.07 |
| Tórshavn | 13.12 |
| Skúvoy | 13.27 |
| Dímun | 13.32 |
| Skúvoy | 13.37 |
| Tórshavn | 13.52 |
| Klaksvík | 14.04 |
| Klaksvík | 15.00 |
| Svínoy | 15.12 |
| Kirkja | 15.16 |
| Hattarvík | 15.19 |
| Klaksvík | 15.37 |
| Tórshavn | 15.49 |
| Koltur | 15.54 |
| Vágar | 16.01 |

| MIKUDAG | Fráferð |
|---|---|
| Vágar | 09.45 |
| Gásadal | 09.51 |
| Mykines | 09.57 |
| Vágar | 10.08 |
| Vágar | 11.10 |
| Koltur | 11.17 |
| Tórshavn | 11.22 |
| Skúvoy | 11.37 |
| Dímun | 11.42 |
| Froðba | 11.51 |
| Froðba | 12.40 |
| Dímun | 12.49 |
| Skúvoy | 12.54 |
| Tórshavn | 13.09 |
| Klaksvík | 13.21 |
| Svínoy | 13.33 |
| Kirkja | 13.37 |
| Hattarvík | 13.40 |
| Klaksvík | 13.58 |
| Klaksvík | 14.45 |
| Tórshavn | 14.57 |
| Koltur | 15.02 |
| Vágar | 15.09 |

| FRÍGGJADAG | Fráferð |
|---|---|
| Vágar | 09.45 |
| Gásadal | 09.51 |
| Mykines | 09.57 |
| Vágar | 10.08 |
| Vágar | 11.10 |
| Koltur | 11.17 |
| Tórshavn | 11.22 |
| Skúvoy | 11.37 |
| Dímun | 11.42 |
| Froðba | 11.51 |
| Froðba | 12.40 |
| Dímun | 12.49 |
| Skúvoy | 12.54 |
| Tórshavn | 13.09 |
| Klaksvík | 13.21 |
| Svínoy | 13.33 |
| Kirkja | 13.37 |
| Hattarvík | 13.40 |
| Klaksvík | 13.58 |
| Klaksvík | 14.45 |
| Tórshavn | 14.57 |
| Koltur | 15.02 |
| Vágar | 15.09 |
| Vágar | 15.25 |
| Gásadal | 15.31 |
| Mykines | 15.37 |
| Vágar | 15.48 |

| Prísir | Mykines | Gásadal | Vágar | Koltur | Tórshavn | Skúvoy | Dímun | Froðba | Klaksvík | Svínoy | Hattarvík | Kirkja |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mykines | | 85,- | 145,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Gásadal | 85,- | | 145,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Vágar | 145,- | 145,- | | 130,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Koltur | 290,- | 290,- | 130,- | | 85,- | 215,- | 215,- | 290,- | 290,- | 290,- | 290,- | 290,- |
| Tórshavn | 215,- | 215,- | 215,- | 85,- | | 130,- | 130,- | 215,- | 215,- | 215,- | 215,- | 215,- |
| Skúvoy | 335,- | 335,- | 335,- | 215,- | 130,- | | 85,- | 85,- | 335,- | 335,- | 335,- | 335,- |
| Dímun | 335,- | 335,- | 335,- | 215,- | 130,- | 85,- | | 85,- | 335,- | 335,- | 335,- | 335,- |
| Froðba | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 85,- | 85,- | | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Klaksvík | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | | 110,- | 110,- | 110,- |
| Svínoy | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | | 110,- | 110,- |
| Hattarvík | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | 110,- | | 85,- |
| Kirkja | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | 110,- | 85,- | |

BÍLEGGING
Tel 34 10 10 - Fax 34 10 01
Mánadag - Fríggjadag
Kl 08.00 - 16.00
Sunnudag
Kl. 12.00 - 16.00

BØRN
0 - 6 ár: Ókeypis
7 - 13 ár: 50%

VIÐFØRI
Í mest lagi 20 kg.

- galdandi 1. oktober - 1. mai 2002

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 10 - Fax 34 10 01
www.atlantic.fo




# Samanlegging er leiðin framá

**Mánadagin verður fólkaatkvøða á Skála um samanlegging við Runavíkar kommunu. Borgarstjórin, Kári Johannesen, mælir borgarum sínum at greiða atkvøðu fyri samanlegging, tí tað er einasta leiðin framá. Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavík, er eisini heitur forsprákari fyri eini sameindari kommunu**

SAMANLEGGING
*Stefan í Skorini*

Borgarstjórin á Skála heldur, at einki annað munagott alternativ er til eina samanlegging, sum er besta loysnin. Framtíðin liggur í stórum eindum og eini sameindari kommunu á Skálafjørðinum.

– Einasta gongda leiðin hjá Skála er at leggja saman við Runavíkar kommunu, sigur Kári Johannesen, sum leggur afturat, at tað hevur gingið stak illa hjá Skála kommunu seinastu árini, og henda gongdin kann vendast, um lagt verður saman. Hansara vón er, at íløgukarmurin soleiðis kann økjast.

Mánakvøldið var borgarafundur í ítróttarhøllini á Skála, har bygdaráðið kunnaði borgarar á Skála um samanleggingina, sum verður veruleiki, um bygdarfólkið tekur undir við henni.

Bygdaráðið hevur sett ta treyt, at minst 2/3 av teimum, sum greiða atkvøðu, skulu vera fyri. Um meirilutin er minni enn 2/3, verður samanleggingin av ongum. Bygdarfólkið hevur ta fatan, at tað verður ein meiriluti fyri samanleggingini, men spurningurin er, um hesin meirilutin verður nóg stórur.

Fólkaatkvøðan á Skála verður mánadagin 8. oktober og í Runavíkar kommunu dagin eftir tann 9. oktober. Um bæði bygdaráðini fáa stuðul fyri síni ætlan, so verður sáttmáli undirskrivaður mikudagin 10. oktober.



*Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu, og Kári Johannesen, borgarstjóri á Skála, vilja fegnir leggja báðar kommunurnar saman. Báðir verða so ikki borgarstjórar eftir næsta val*

*Mynd: Stefan í Skorini*

Samanleggingin verður framd í verki beint eftir næsta kommunuval 1. januar 2005, og hesin sáttmálin kann ikki sigast upp.

## Betri tænastu

Á borgarafundinum varð roynt at sannføra borgararnar um, at samanlegging er besta loysnin. Sáttmálin, ið bygdaráðini saman við Christiani Andreasen hava gjørt, varð lagdur fram, og hann legði upp til eitt størri samstarv millum bygdirnar.

– Vit meta okkum standa sterkari í kappingini við Havnina, um vit eru saman við eini aðrari kommunu. Vit standa eisini sterkari í kappingini um arbeiðspláss, tá vit eru saman við Runavíkar kommunu, segði Kári Johannesen á borgarafundinum. Hann væntaði eisini, at bygdin fór at fáa fleiri arbeiðspláss eftir samanleggingina.

Lagt varð upp til, at borgarin fór at fáa eina betri tænastu í eini sameindari kommunu. Dentur varð eisini lagdur á, at fleiri samanleggingar óivað standa fyri framman, og tí er tað umráðandi hjá Skála at vera við frá byrjan, so bygdin kann hava ávirkan á framtíðar samanleggingar á Skálafjørðinum.

Ein bygdaráðslimur í Runavík vildi vera við, at henda samanleggingin fór at fáa eina domino-ávirkan. Tá henda samanleggingin varð framd, fóru hinar kommunurnar at koma aftaná, so at Skálafjørðurin fór at vera ein stórkommuna.

## Skála liggur eftirá

Nakrir av áhoyrarunum vóru ikki so heitir fyri samanleggingini sum tey í pallborðinum.

Onkur vildi vera við, at Skála fór at liggja eftirá í einum samstarvi við eina størri kommunu, og at bygdin ikki fór at fáa nakrar fyrimunir av samanleggingini. Hesum vístu bæði Rodmundur Nielsen og Kári Johannesen aftur. Teir vilja vera við, at báðar kommunurnar í framtíðini kunnu samskipa sínar íløgur á skilabetri, og á henda hátt kunnu tær spara fleiri milliónir.

– Alt fleiri uppgávur verða lagdar út til kommunurnar at umsita, og tí er tað betri at vera saman í størri eindum. Soleiðis betra vit umsitingarligu tænastuna í kommununum, segði Kári Johannesen.

Bygdaráðslimirnir á Skála hava samtykt at leggja uppskotið fyri á fólkaatkvøðu, men sum skilst eru allir ikki persónliga fyri eini samanlegging.

Í nýggja býráðnum verða ellivu fólkavald umboð, og har kunnu skálabúgvar vænta at fáa trý umboð, um tey standa saman um síni valevni. Samstundis sum býráðslimir verða valdir, skal fólkið eisini velja eina Skálanevnd. Umboð í hesi nevnd kunnu ikki sita í býráðnum samstundis. Henda nevndin skal arbeiða saman við býráðnum um viðurskifti á Skála. Býráðið skal hava høvuðssæti á Saltangará, men ein skrivstova skal eisini vera á Skála. Eingin í umsitingini verður uppsagdur eftir samanleggingina.

Á Skála búgva í dag 665 fólk, og í Runavíkar kommunu búgva 2506 fólk. Hesi verða savnað í eina kommunu, um fólkið sigur ja á atkvøðugreiðslunum.

Framtíðin liggur í einum sameindum Skálafjørði, og tað er endaliga málið hjá teimum, sum standa fyri hesi ætlanini.



*Stórur áhugi var fyri fundinum í ítróttarhøllini á Skála, har borgarar vórðu upplýstir um ætlanina við samanleggingini*

*Mynd: Stefan í Skorini*

Eivind Jacobsen, borgarstjóri á Strondum:

## – Eingin fyrimunur við samanlegging

**Tað hevði verið meira upplagt hjá Skála at leggja saman við Strondum heldur enn Runavík, men borgarstjórin á Strondum er ikki so heitur fyri samanlegging. Tað er tvætl at tosa um kapping við Havnina, heldur hann**

SAMANLEGGING
*Stefan í Skorini*

– Eg havi enn ikki fingið nóg góðar grundgevingar fyri, at tað er betri at leggja kommunurnar við Skálafjørðin saman, sigur Eivind Jacobsen, sum hevur verið borgarstjóri á Strondum síðan valið.

Hann heldur, at tað ber ikki til at tosa um at kappast við miðstaðarøkið, tí munurin er somikið stórur, at tað er líka mikið, um kommunan telur 2000 ella 4000 íbúgvar.

– Smærru kommunurnar skulu ikki apa sær eftir Havnini, men tær skulu finna uppá okkurt annað alternativ.

Hann leggur afturat, at orsøkin til samanlegging er, at kongaríkið hjá onkrum er ov lítið, og tí vilja teir leggja meira inn undir seg. Eivind er eisini bangin fyri, at alt fer at enda í Runavík, og at smærru plássini gerast taparar.

Enn hevur eingin fríggjað til Strendur um hjúnaband. Eivind fer ikki at venda einum slíkum uppskoti bakið beinanvegin, men hann skal hava frægari grundgevingar enn hesar.